MEIRA ENN BERUR
HYDRAULIKKUR

HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

NORÐ TRUKK
TRUKKAR & LYFTIÚTGERÐ

HYDROCAT



# MEIRA ENN BERUR HYDRAULIKKUR

At KJ HYDRAULIK veitir hydrauliskar tænastur og hydrauliska útgerð, so sum spøl, kranar og gravimaskinur, vita tey flestu. At KJ HYDRAULIK eisini selir dieselmotorar, generatorar, framleiðir aliringar og tvíkiljur og skaffar alskyns eykalutir til skip í Føroyum og uttanlanda, er ikki so eyðsýnt.

KJ HYDRAULIK umboðar m.a. Rapp Hydema trolspøl, Palfinger kranar, JCB maskinur og Iveco motorar og veitir alla hydrauliska tænastu, tørvur er á.

KJ HydroCat er navnið á tvíkiljunum, ið framleiddar verða til alivinnuna.

KJ NORÐ TRUKK er felag hjá KJ, ið selir og umvælir Linde trukkar og Zepro lyftir.

Her er at síggja ein lítil partur av okkara samlaða úrvali. Felags fyri lutirnar er, at teir flestu eru á goymslu á Kambsdali ella í Havn.



KJ NORÐ TRUKK selir og veitir tænastu uppá Linde gaffiltrukkar og bingjutrukkar. Linde trukkarnir eru teir mest framkomnu og mest økonomisku trukkarnir á marknaðinum, og fáast sum el-trukkar, diesel- og gasstrukkar í støddum frá 1t. til 45t. Stáplarar og plattavognar eru eisini at fáa.



## Spøl

Sum umboð fyri Rapp Hydema kunnu vit bjóða hydraulisk og elektrisk spøl og spælskipanir til allar trolarar og nótabátar. Vit framleiða eisini hydraulisk og elektrisk spøl eftir kundans ynski. Lossispøl til lastbilakranar og sjókranar eru vanliga á goymslu.



## Kranar

Sum umboð fyri Palfinger lastbilakranar og Palfinger Marine sjókranar veita vit kranar úr 0,8tm til 150tm. Kranarnir fáast við allari nútímans útgerð, ið ger arbeiðið bæði skjótt, lætt og trygt. Nógv eykaúgerð til kranar kann eisini veitast.



## Entreprenørmaskinur

Vit eru sølu- og tænastuumboð fyri JCB, Huddig og Vibromax entreprenørmaskinur, sum umfatar beltimaskinur til 46t., gummigedir upp til 20t, dumparar upp til 25t., rennigravarar upp til 13t., mini- beltimaskinur upp til 8t. og trumlir upp til 20t. Eisini veita vit útgerð og eykalutir til ymisk onnur sløg av maskinum.



## Motorar

Vit umboða IVECO (FPT) marine dieselmotorar úr 20HK til 1800HK, og generatoranlegg úr 29kw til 750kW. Teir nýggjur motorarnir eru sera økonomiskir og friðarligir og hava framkomna elektroniska stýring.



## Hydraulikk Pumpur

Úrvalið av hydraulikkpumpum umfatar stempul-, veingja-, og tannhjólspumpur við fastari og variablari oljumongd, í øllum arbeiðstrýsti, ið tørvur er á.



## Hydraulikk Motorar

Fullfíggjað úrval av skjóttgangandi og seintgangandi hydraulikkmotorum, sum tannhjólsmotorar, gerotor motorar, stempulmotorar, veingjamotorar í føstum og variablum oljumongdum.



## Hydraulikk Ventilar

Til stýring av einfaldum on/off funktiónum og stýring av oljuflóði, trýsti og last, hava vit stórt úrval av manøvriventilum, servoventilum, trýst- og flóðventilum, lasthaldiventilum, proportionalventilum og fjarstýringsventilum.



## Hydraulikk Filtur

Úrvalið av hydraulikkfiltrum nøktar øll krøv til reinleika, oljumongd og trýst. Á goymslu er breitt úrval av filturhúsum og filtur elementum til hátrýst og hydraulikktangan, umframt off-line filturstøðir, ið m.a. taka vatn úr oljuni.



## Slangur & Rør

Breitt og stórt úrval av kromatiseraðum og AISI316 sýruføstum hydraulikkrørum frá 6-42 mm og 2- og 4-lags hydraulikkslangum úr 3/16" til 2" á goymslu. Eisini hava vit lágtrýst oljuslangur, rustfríar frystislangur, termoplast slangur og PVC slangur. Goymslan av fiskapumpuslangum úr 14" til 18" er munadygg.



## Fittings

Landsins besta og størsta úrval av hydraulikkfittingi til slangur og rør. Fittingið fæst í øllum støddum og øllum forskúvningum, í kromatiseraðum og AISI316 sýruføstum stáli.



## Ventilar

Úrvalið umfatar kúluventilar, skiftiventilar, nálaventilar, drøvliventilar, kontraventilar, slangubrotsventilar, snarkoblingar, 3- & 6-vegisventilar, bæði hond- og elektriskt stýrdir.



## Legur

Eitt sera breitt úrval av kúlulegum, rullulegum, koniskum og sferiskum legum, Y-legum, flansalegum og leguhúsum í vanligum stáli, rustfríum stáli og syntetiskum tilfari. Leguframleiðarar eru SNR/NTN, PTI, FAG/INA og SKF.



## Tettiringar

Úrvalið umfatar simmiringar, o-ringar, u-mansjettur, skraviringar, V-ringar, stempulskógvaringar og ymisk pakningasett.



## Transmissiónir

Úrvalið av transmissiónum umfatar klókoblingar, tannkranskoblingar, mekaniskar koblingar, magnetkoblingar, reimskivur, kílareimar, tannreimar, ketuhjól og ketur.



## Hydraulikk Stempul

Vit framleiða hydraulikkstempul eftir kundatørvi við levering eftir 1. degi. Harumframt hava vit sýruføst AISI316 hydraulisk stempul og luftstempul. Eisini umvæla vit øll stempul, skifta tettningar, stempulstengur og stempulrør.



## Filtur

Landsins størsta úrval av smyrjoljufiltrum, brennoljufiltrum, luftfiltrum, separatorfiltur, vatnútskiljarafiltur, kølivatnsfiltur umframt hydraulikkfiltur.

DANAK
Reg.nr. 5001
Kvalitetsstyringssystem certificeret i henhold til **DS/EN ISO 9001:2000** af Det Norske Veritas, Danmark A/S
Certificeringsafdelingen




KREA.FO · TEL 4780 80 · PRENT: TONITO

**KJ HYDRAULIK**
POWER & MOTION CONTROL

Boks 110 · FO-530 Kambsdalur
Tel 407000 · Faks 407001
info@kj.fo · www.kj.fo

Søludeild, Kambsdal · Tel 407000 · Faks 407001
Goymsla, Kambsdal · 407030 · Faks 407031
Verkstaður, Kambsdal · Tel 407000 · Faks 407003
Søla & Goymsla, Tórshavn · Tel 407070 · Faks 407002

**KJ NORÐ TRUKK**
TRUKKAR & LYFTIÚTGERÐ

Mykinesgøta 3
Boks 1315 · FO-110 · Tórshavn
Tel 315136 · Faks 310931
nordtrukk@nordtrukk.fo
www.nordtrukk.fo